Tel: 41 42 43 • Fax: 41 42 44 • Postboks 39
FO-520 Leirvík • www.irf.fo • irf@irf.fo

IRF

## Avloysari til Brennistøðina hjá IRF

Søkt verður við hesum eftir einum avloysara til Brennistøðini hjá IRF.

Avloysarastarvið byrjar 9. mai 2011 og endar 26. august 2011.

**Arbeiðið umfatar:**
1. Vaktararbeiði
2. Viðlíkahaldsarbeiði
3. Annað fyrifallandi arbeiði innan IRF

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur viðkomandi útbúgving, t.d. maskinmeistari, elektrikari ella maskinsmiðjur, hevur góðan teldukunnleika, og er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknir, saman við prógvum og møguligum viðmælum, skulu sendast til IRF, Víkarvegur, FO- 520 Leirvík, og skulu vera okkum í hendi innan fríggjadagin 29. apríl 2011.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja tlf. 414243 ella 234214, Jacob Petur Johannesen.

**IRF**
Postboks 39
520 Leirvík

## LIÐUG/UR Á MIÐNÁMSSKÚLA?

Og ert tú fyrikomandi og nærløgd/lagdur, hevur góð samstarvsevni og ert ábyrgdarfull/ur?

**So er hetta kanska nakað fyri teg.**

GrannskoðaraStovan sóknast eftir tveimum næmingum at byrja aftan á summarfrítíðina.

Sum næmingur hjá okkum fært tú frá fyrsta degi praktiskar uppgávur og samband við viðskiftafólk.

Arbeiðið fevnir um so at siga øll øki innan grannskoðan, roknskap, fíggjarliga ráðgeving og skattaviðurskifti.

Umframt at fylgja innanhýsis starvsfólkaútbúgving vænta vit, at tú byrjar at lesa HD. Vit gjalda sjálvandi allar útreiðslur í sambandi við útbúgvingina.

Vilt tú hava meir at vita, kanst tú venda tær til:
Mark T. Højgaard tlf 59 16 01 ella
Eyðbjørg Thorleifsson tlf 59 16 02

Umsóknarfreistin er 15. mai 2011. Umsóknir við avritum av viðkomandi upplýsingum og prógvum, skulu sendast við telduposti til mh@gs.fo ella sum vanligt bræv, til:

**GrannskoðaraStovan Sp/f**
Postboks 190
610 Saltangará

GrannskoðaraStovan Sp/f hevur 8 starvsfólk, herav 4 skrásettar grannskoðarar.

GrannskoðaraStovan Sp/f er partur av ERFA-samtakinum, tí má roknast við samstarvi við starvsfólk atknýtt ERFA, tá talan er um størri uppgávur. 19 starvsfólk, herav 6 skrásettir grannskoðarar, eru atknýtt ERFA samtakinum

WWW.GS.FO GS@GS.FO

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

## Fróðskaparsetur Føroya søkir eftir rektara

Starvið sum rektari við Fróðskaparsetur Føroya er leyst at søkja

**Starvsøki**
Sambært løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 hevur rektarin dagligu leiðsluna av Fróðskaparsetri Føroya innan teir karmar, sum stýrið hevur ásett. Víst verður í hesum sambandi til Rektarafyriskipan frá 17. mars 2010.

Umsøkjarar eiga á heimasíðuni www.setur.fo at gera seg kunnugar við skjølini: Rektarafyriskipan; Fróðskaparsetrið, avbjóðingar og krøv til rektaran; Tíðarætlan og setanarnevnd.

**Førleikakrøv**
Í løgtingslógini um Fróðskaparsetur Føroya § 14, stk. 1 er ásett soljóðandi:

"Rektari skal hava royndir av leiðslu og kunnleika um granskingarumhvørvi, skal hava royndir og innlit í útbúgvingarøkið og hava skil fyri samspælið millum stovnin og samfelagið sum heild."

Somuleiðis verður kravt, at komandi rektarin hevur skjalprógvaðan granskingarførleika.

**Setanartreytir og umsókn**
Starvið sum rektari verður lønt í 39. lønarflokki sambært lønartalvuni fyri Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannastarv, og við 15% í eftirlønargjaldi.

Starvið verður áramálssett og setanartreytir annars verða ásettar í sersáttmála. Veitt verður viðbót áljóðandi 10% fyri áramálssetan.

**Umsóknarfreistin er 27. apríl 2011.**

Umsóknir saman við avriti av próvskjølum, CV og arbeiðsroyndum skulu sendast stýrisformanninum:

Herálvur Joensen
Sendistova Føroya í Keypmannahavn
Strandgade 91, 4. loft
1401 København K
Danmark

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Herálv Joensen, stýrisformann, á heralvurj@mfa.fo ella á tlf. +45 32833770.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

ÓKEYPIS útkoyring í Tórshavn FÓÐURSØLAN

## Kvalitetsfóður til kettur og hundar

Bílegg á telefon 50 20 22

SKYTTENs hunda- og kettufóður er framleitt síðan 1970 og inniheldur fisk og høsnarunga.

**Fóðurið inniheldur ikki...**
- haldevni
- aromaevni
- litevni
- sojaprotein



Hundafóður 20 kg SPECIAL bert 450,-

Kettufóður 15 kg KAT bert 390,-

Tel. 50 20 22 · info@fodursolan.com · www.fodursolan.com

## Jørð í Kvíkvík til sølu

Matr. 40a 2 gl. Frammi í Haga, Kvívíkar bygd.

Innangarðs mat. 70 Kvívíkar bygd, so sum matrikulin vísir. (nógvur veltur bøur).

Uttangarðs 1 mørk í hagapartinum Frammi í Haga, Kvívíkar bygd. (felagshagi í alt 12 merkur = matr. 401a).

**Nærri við at ringja 21 97 26**

## Marknaðardagur í Sjónleikarhúsinum

Marknaðardagur í Sjónleikarhúsinum leygardagin 7. mai 2011 kl. 10.00 til 15.00

Vit taka ímóti lutum gerandisdagar frá kl. 08.00 til 16.00.

Í viku 16 og 17 frá kl. 08.00 til 18.00

Í viku 17 heinta vit lutir mikudag, hósdag og fríggjadag aftaná kl. 16.00

**Havnar Sjónleikarfelag**

## KRÍGSSAVNIÐ

Lýst verður til ársaðalfund í Krígssavninum hósdagin hin 28. apríl 2011, kl. 20.00.

Fundurin verður í kantinuni við Krígssavnið, Leitisvegur 58, Miðvági. Skrá smb. lógum felagsins.

**Nevndin**

Les Sosialin so ert tú við